FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 21. desember 2021
J. nr.: 21/24695-3

Svar til fyrispurning 52-106/2021 frá Ingilín Didriksen Strøm, løgtingskvinnu, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um lýsingarbløð hjá Posta.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat heldur landsstýrismaðurin um at seta í verk eina skipan, har lýsingabløð hjá Posta einans verða borin út til tey, sum aktivt hava valt at fáa lýsingabløð ?
2. Hvussu nógv lýsingabløð verða borin út til hvørt húsarhald á hvørjum ári?
3. Hvussu nógv húsarhald hava valt "Ongar lýsingar – takk" skipanina hjá Posta?

Svar:
Fíggjarmálaráðið hevur vent sær til Posta við spurningunum um tal av lýsingarbløðum, og um hvussu nógv hava valt at fáa frámerki, sum vísir, at viðkomandi vil sleppa undan áheitanum í sambandi við marknaðarføring. Sum kunnugt er Posta skipað sum partafelag og verður rikið við armslongd frá landsstýrinum.

Útbering av lýsingarbløðum er privat vinna, har fleiri privatar fyritøkur hava møguleika at koma inn á marknaðin í fríari kapping. Posta letur av somu orsøk ikki upplýsingar um nøgdir eins og onnur feløg, ið virka í fríari kapping. Tó verður upplýst, at umleið 15% hava valt ikki at fáa lýsingar, og at talið er spakuliga vaksið seinastu árini.

Í løgtingslóg um fólkayvirlit § 26, stk. 2 er ásett, at øll kunnu venda sær til bústaðarkommununa til at fáa frámerki sett í Landsfólkayvirlitið, sum vísir, at viðkomandi vil sleppa undan áheitanum í sambandi við marknaðarføring. Tað er Umhvørvis- og vinnumálaráðið, sum varðar av hesi lóggávu og av marknaðarføringslógini, ið ásetur reglur um lýsingarbløð og aðra beinleiðis marknaðarføring.

Viðvíkjandi spurninginum um møguliga broyting í nevndu lóggávu verður vísst til Umhvørvis- og vinnumálaráðið.

Tinganes 21. desembur 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum